# FM-kappingar

**Seinastu báðar vikurnar hava tríggjar kappingar í bogaskjótin verið hildnar**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*



*Kristian Niclasen úr Tambar gjørdist føroyameistari í recurve skjóting*

### 12 metur - ung

Leygardagin tann 15. mars skipaði Bogaskjótifelagið Ørvur í Runavík fyri FM-kapping á 12 metra frástøðu fyri yngru bogaskjúttarnir.

Í bólkinum compound: Føroyameistari Alvi Joensen við (265+261) 526 stigum, nr. 2 Kaj Johannesen við (262+233) 495 stigum og nr. 3 Viljormur Davidsen (221+224) 445 stigum. Allir úr Ørvi.

Í bólkinum recurve: Føroyameistari Eirikur í Jákupsstovu við (263+263) 526 stigum, nr. 2 Annika Vang við (250+261) 511 stigum, bæði úr Ørvi, og nr. 3 Bjartur Clementsen úr Tambar við (244+231( 475 stigum.

Heiðurmerkir til kappingina hevði Statoilstøðin á Saltangará latið.

### 15 metur - ung

Leygardagin tann 22 mars skipaði Bogaskjótifelagið Tambar í Havn fyri FM-kapping á 15 metra frástøðu fyri yngru bogaskjúttarnir.

Í bólkinum compound gekk javnt á millum 3 tey fremtu og var tað serliga ein av teimum nýggju skjúttunum Kaj Johannesen, sum gjørdi um seg við at leggja seg sum nummar tvey í steðginum.

Endaliga úrslitið var, at Alberta Gaardlykke gjørdist føroyameitari við (274+272) 546 stigum, br. 2 Kaj Johannesen við (269+271) 540 stigum og nr. 3 Alvi Joensen við (263+258) 521 stigum.

Í bólkinum vóru 3 persónlig met har Kaj forbetraði seg við 57 stigum á frástøðuni. Viljormur Davidsen, sum gjørdist nr. 4 við 505 stigum, forbetraði seg við 48 stigum. Eyðfinn Poulsen, sum gjørdist nr. 5, forbetraði seg við 50 stigum.

Allir compoundskjúttarnir eru úr Ørvi.

Í bólkinum recurve vóru tað tveir skjúttar, sum løgdu seg á odda beinanvegin og helt henda støða til endan. Eirikur í Jákupsstovu, Ørvur, gjørdist føroyameistari við (272+277) 549 stigum og persónligum meti, hann forbetraði seg við 25 stigum á frástøðuni. Nr. 2 bleiv Bjartur Fríði Clementsen, Tambar, við persónligum meti (264+256) 520 stigum. Hann forbetraði seg við 53 stigum. Nr. 3 bleiv Martin Johannesen, Tambar,við (230+224) 454 stigum.

### Ársins bogaskjúttar

Millum yngru bogaskjúttarnar er vanligt at lata steyp til bestu skjúttarnar gjøgnum vetrarhálvuna.

Í recurve bleiv Eirikur í Jákupsstovu valdur til besta skjútta, tí hann hevur vunnið FM á 12 og 15 metrum. Eisini hevur hann vunnið eina aðra kapping í vetur, meðan hann hevur verið nr. 2 í øllum hinum kappingunum.

Í recurve bleiv Kaj Johannesen valdur til besta skjútta, tí hann hevur vunnið silvur heiðursmerkir til FM á 12 og 15 metrum. Og serliga tí hann hevur gjørt so skjót og stór framstig seinastu 2-3 mánaðirnar, at hann longu nú kann teljast millum bestu yngru compoundskjúttar í landinum.

Heiðursmerkir og steyp hevði Statoilstøðin á Saltangará latið.

### Fegnast um úrslit

Bogaskjótideildin fegnast um stóru framgongdina millum yngru skjúttarnar. Deildin byrjaði fyri 3 árum síðan at keypa útgerð, sum feløgini hava leigað út til skjúttarnar, og hevur tað avgjørt givið úrslit, at hvør skjútti hevur sína egnu útgerð. Eisini hava fleiri valt at keypa útgerð.

Bogaskjótideildin takkar eisini teimum, sum í báðum feløgunum hava verið so íðin og eldhugaði at venja tey ungu.

### 18 metur — vaksin

Sunnudagin tann 23. mars skipaði Tambar fyri FM á 18 metra frástøðu vyri tey vaksnu.

Hetta man vera javnasta kapping í báðum bólkum í longri tíð, nógvur spenningur og skiftandi, hvør hevði leiðsluna.

Í bólkinum compound var sera javnt millum 5 teir fremstu skjúttarnar, men tá síðsti pílurin var skotin var Per Holm Andersen føroyameistari við (282+284) 566 stigum, nr. 2 var Schandorff Vang við (283+277) 560 stigum og nr. 3 Albert Dam við (275+284) 559 stigum. Nr. 4 var Jóannes Poulsen við 558 stigum og nr. 5 Anders Jönsson við 554 stigum. Allir úr Ørvi.

Í bólkinum recurve var eisini sera javnt millum 3 teir fremstu skjúttarnar. Kristian Niclasen, Tambar, bleiv føroyameistari við (255+266) 521 stigum, nr. 2 Rógvi Mohr, Ørvur, við (260+257) 517 stigum og nr. 3 Rói Johannesen, Tambar, við (259+250) 509 stigum. Allir settu persónlig met.

Heiðursmerkir hevði Statoilstøðin á Saltangará latið.

# Óli á veg úr botninum

**Heldur ikki í næstu royndini eydnaðist tað Christian Høgna Jacobsen og Vejle at fáa stig burturúr**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Setningurin h
já Óla Johannesen og hinum Hvidovre spælarunum er greiður. Teir hugsa ikki um superliguna, sum Hvidovre fólkini droymdu um fyri bara hálvum øðrum ári síðani. Nú ræður tað um at sleppa burtur úr niðurflytingar suppuni. Hvidovre er framvegis á niðurflytingarplássi, men í vikuskiftinum styrktu teir ikki so lítið um sína støðu.

Óli Johannesen og liðfelagarnir vóru í Odense. Mótstøðuliðið var B1913, og tað eydnaðist høvuðsstaðarfelagnum at sleppa um Stórabeltsbrúnna aftur við øllum stigunum. Úrslitið var 1–0. Miðskeiðis í 1. hálvleiki skoraðu teir sigursmálið.

Hjá Vejle gongur tað alt annað enn væl. Christian Høgni Jacobsen verður roknaður sum ein av stuðulsspælarunum. Hann er vongverji í høgru, men á venjingarleguni í Kina undan kappingarbyrjan vísti álopsmaðurin á føroyska landsliðnum, at hann er væl førur fyri at spæla á miðvøllinum.

Men Christian Høgni er sjálvsagt ikki nøgdur við gongdina hjá Vejle. Í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin taptu teir á heimavølli, og hesa ferð taptu teir á útivølli. Teir vóru á Gentofta stadion, har B1903 áður hevði heimavøll. Nú er Gentofte stadion bara heimavøllur hjá HIK. Felagið hjá Ole Madsen, sum í seksti árunum var kendasti álopsspælarin í Danmark, hevur ongantíð staðið seg serliga væl, men nú eru teir í næstbestu deildini, og teir vóru nóg góðir at vinna 2–1 á Vejle. Gestirnir løgdu seg á odda, men heimaliðið javnaði í 1. hálvleiki og í 2. hálvleiki skoraðu teir sigursmálið.

Oddaliðið Herfølge fekk málleysan javnleik í Fredericia. Frem er framvegis næstfremst, men Ole Mørch var alt annað enn nøgdur. Púra óvæntað tapti Frem á heimavølli 2–1 ímóti B1909, sum ikki hevur staðið seg væl í ár.

Horsens og Johan B. Hansen fingu 2–2 á heimavølli ímóti Ølstykke, og Randers Freja, har Atli Gregersen framvegis er í hópinum uttan at sleppa serliga nógv upp í part, tapti 4–2 á útivølli á Eysturbrúgv í Keypmannahavn ímóti Skjold.



# Jón Rói luttekur nú í leyvuveiðu



*Leyvurnar úr FCK hava nú bert fýra stig niður til Jón Róa og Brøndby, og enn eru nógvir dystir eftir at spæla*

**Munurin frá Brøndby og fram til FCK og harvið oddasessin í superliguni er eftir tvey tey fyrstu umførini tódnaður úr níggju og til fýra stig**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í Brøndby er lagið avbera gott. Gula og bláa meistara-0liðið hevur fingið fult í tveimum teimum fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin. Og tá ið oddaliðið FCK bara hevur fingið eitt av seks møguligum stigum, siga teir í Brøndby seg rokna fult og heilt við, at tað fer at bera til hjá teimum at endurvinna meistaraskapin.

Brøndby er á leyvuveiðu, verður sagt í fleiri av donsku fjølmiðlunum. Í hesum liggur sjálvandi, at FCK verður nevnt løverne, og at tað er FCK, sum Brøndby skal rækka fyri at endurvinna DM.

Í vikuskiftinum fer Danmark at spæla EM undankappingardyst í Rumenia. Talan er um bæði spennandi dyst og lyklauppgerð. Morten Olsen hitti landsliðsspælararnar í Vedbæk í gjár, og sjálvandi er áhugin stórur fyri landsliðnum, soleiðis sum hann altíð er tað í Danmark.

Tað hevur leingi verið tosað um uppgerðina ímillum FCK og Brøndby, sum verður í Parkini annan sunnudag. Og eftir at úrslitini hava lagað seg soleiðis, sum tey hava tvær tær seinastu vikurnar, er tað ikki frítt, at tað longu nú verður tosað eins nógv um hesa uppgerðina í Parkini, sum tað verður tosað um landsliðið.

– Vit hava møguleika at røkka FCK, siga Brøndby spælararnir. Michael Laudrup vil ikki siga so nógv. Hvørki hann ella danska pressan halda, at Brøndby sunnudagin spældi serliga væl. Men avrikið var nóg mikið til at vinna 2–0 á Silkeborg, og tað frøddist nógv størsti parturin av teimum 12.759 áskoðarunum um.

– Síðsta heyst vunnu vit ikki, hóast vit spældu væl. Nú vinna vit, sjálvt um spælið kundi havt verið betri, og tað mugu vit gleðast um, sigur Michael Laudrup.

Ímóti Silkeborg hevði venjarin valt at hava Jón Róa Jacobsen á beinkinum. Tá ið sigurin var vísur og áskoðararnir sigrssælir sungu og heiðraðu sínum spælarum sendi Michael Laudrup Jón Róa á vøllin. Tá restaðu tað bara tveir minuttir. Jón Rói kom á vøllin í staðin fyri álopsspælaran Peter Foldgast, sum donsku fjølmiðlarnir vilja vera við var ein av bestu spælarunum á vøllinum.

Brøndby setti hol á, tá ið tað restaðu sjey minuttir av fyrra umfairnum. Málskjútti var júst Peter Foldgast. Við at skora annað vikuskiftið upp í slag staðfesti nýggja stjørnuskotið hjá Brøndby, at eingin orsøk er at iðra seg um, at Peter Madsen er seldur til Týskland.

Tíggju minuttir eftir steðgin økti heimaliðið til 2–0. Málskjútti var Kasper Dalgas. Málið var frágera hegnisliga skotið. Málskjúttin fegnaðist, tað gjørdu áskoðararnir eisini, og tað var týðuligt, at venjarin var ovrfegin. Kasper Dalgas hevur ikki verið so eyðsýndur, sum tað kundi roknast við. Ivaleyst vóna teir í Brøndby, at sjálvsálitið nú verður, sum tað skal vera. Í 1. hálvleiki lobbaði Kasper Dalgas hegnisliga upp um Silkeborg málverjan, men bólturin brast í tvørtræið.

# FCK stórkiksaði í síðstu løtu

**Hóast teir vóru á odda 2–0, tá ið tað restaði eitt korter, so fekk FCK bara eitt stig við sær úr Århus**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað er torført at finna røttu minuna. Seinastu seks árini hevur FCK verið eitt og alt í superliguni hjá fótbóltshugaðum føroyingum. Nú hava teir fullkomuliga sett Toda Jónsson í skuggan, og tað gongur ongan veg. Todi Jónsson er FCK spælari fram til 1. juli. Gongdin higartil í vár kundi bent á, at tað verður neyðugt hjá Hans Backe og serliga Niels Christian Holmstrøm at krúpa til krossin og taka føroyska álopsspælaran við aftur í álopið. Tá verður FCK sjálvsagt aftur sera áhugavert hjá føroyingum.

Hesa ferð var FCK í Århus, og leingi bendi alt á, at tað skuldi ganga, soleiðis sum tað kundi roknast við. Boro Zivkovic setti hol á, tá ið tað restaðu sjey minuttir av 1. hálvleiki, og tá ið Peter Møllre eitt korter undan leikloki økti til 2–0, tóktist sigurin at vera ein fullvísur, sum hann tóktist at vera hjá FS Vágum í Runavík. Men tað gekk ikki hjhá FCK, um enn tað var frægari enn hjá FS Vágum.

Men tað gekk ikki hjá FCK. 17.100 áskoðarar í góða várveðrinum í Århus vóru vitni til, at heimaliðið eftir lítlari løtu skoraði tvey mál og harvið tryggjaði sær týdningarmikið stig. Í báðum førunum var tað bara nítjan ára gamli Leon Andresen, sum var málskjútti. Teir í FCK vóru ikki blíðir. Við sera ólátaðari takling hevði dupulti AGF málskjúttin verið orsøk til, at ein av landsliðsspælarunum hjá FCK, Thomas Røll, var noyddur at taka seg av vøllinum. Skaðin vísti seg at vera so mikið álvurssamur, at Røll nú hevur givið avboð til ferðina til Rumenia. Hann átti at havt verið rikin av vøllinum, og tað líkist ongum, at hann ikki sá nakað sum helst kort, søgdu FCK menninir um AGF málskjúttan, og teir í AGF vóru ikki ósamdir í, at taklingin átti at havt okkurt slag av korti í kjalarvørrinum.

Hans Backe, FCK venjarin, royndi at vera fattur sum altíð, tá ið hann hitti presssuna. Hann ásannaði, at munurin aftur til Brøndby er tódnaður heilt nógv, men samstundis vildi hann ikki hoyra talan um, at fyrsta plássið og harvið meistaraheitið er um at gleppa FCK av hondum. Venjarin helt, at hansara lið átti at havt vunnið, og hann segði seg gleðast um, at liðið so leingi spældi skilagott og støðugt.

Peter Møller var í FCK álopinum saman við Zuma. Peter Møller er toppskjútti hjá FCK við átta málum. Næstbesti FCK málskjúttin er Todi Jónsson. Hann hevur skorað seks ferðir. Spurningurin er so, um hann fer at fáa møguleikan at økja um máltalið, ella um FCK leiðslan í hevnisøku heldur vil goyma hann enn at hava eitt so gott lið, sum tað ber til, nú teir tykjast skula stríðast meiri fyri DM heitinum, enn tað tóktist at vera neyðugt fyri bara tíggju døgum síðani.

### Skandala

Á triðja plássi er FC Midtjylland. Sunnudagin vunnu teir 2–1 í Gladsaxe ímóti AB. Bæði FCM málini skoraði Frank Kristensen. Hann hevur higartil skorað tíggju mál, og hann er nú toppskjútti í superliguni. Men hann sigur seg ikki ætla at gera nakað burturúr sær sjálvum. Eg skjóti mál fyri liðið og ikki fyri meg sjálvan, sigur hann við fjølmiðlarnar. Og so leggur hann afturat, at nú vilja miðlarnir lyfta hann so høgt upp, at hann ikki fer at fáa føturnar niður á jørðina. Um tað hevði eydnast, so hevði hann ikki verið førur fyri at skora, og so hevði tað verið søgan hjá fjølmiðlunum, sigur sinniligi vesturjydin.

Í Aalborg var tað stórt vónbrot, at tað eydnaðist snildum Esbjerg liði at fara avstað við øllum. Esbjerg vann 1–0., og einsamalli málskjúttin var Jan Kristensen. Tað verður roknað við, at 21 ára gamli miðvallarin skjótt fer at fáa okkurt tilboð úr útlandinum.

Í Odense er fótbóltslagið heilt gott. Í fleiri ár hevur áhugin millum áskoðararnar ikki verið tann, sum hann t. d. var í áttati árunum. Men nú tevja teir góðar tíðir í Odense. 7.007 møttu sunnudagin, og ivaleyst koma tað uppaftur fleiri næstu ferð. OB vann 3–1 ímóti uppflytaraliðnum úr Køge.

Síðsti dysturin skuldi havt verið í Viborg. Christian Andersen og hansara menn vóru komnir úr Farum. Men tá ið dómarin í góða várveðrinum fór at skoða vølllin, var tað skjótt, at teir staðfestu, at tað bar ikki til at spæla. Tað var frost í einum parti av svørinum. Roynt var at fáa frostið burtur, men tað segði tað sama.

Hitarør eru í vøllinum, men følararnir, sum gera av, um tað er neyðugt við hita, eru bara í tí partinum av vøllinum, har sólin hevur sæð. Tí hevur tað ikki verið hiti á anlegginum. Tað er ein stór skandala, søgdu teir í Farum, og teir, sum hava við fótbóltin í Viborg at gera, góvu teimum rætt.